# 2004

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – B68

**LANDSKAPPING**

**Leygardagin 20. juni 2004 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 3 2004**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Álvur Haraldsen/
Sosialurin
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Karstin Joensen tekur bóltin fyri føturnar á Jónstein Petersen úr NSÍ. Myndin er frá fyrru semifinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

**TAÐ HALDA VIT**

# EM setur krøv ella ...

Tað er ikki bara sum at siga tað, at skula spæla 1. deildar fótbólt í dag og komandi vikurnar, nú EM í Portugal er byrjað. Á hillini og bakkanum standa menn og kvinnur og meta um avrikini hjá Magna á Lakjuni og Øssuri Hansen. Fólk, sum júst hava sæð ella fara at hyggja eftir, hvussu Beckham og Zidane ganda við rundu kúluni niðri í Lissabon. Munurin er sjónligur, eingi ivi um tað, og kemur hetta óivað at gera komandi dystirnar í føroysku kappingini nakað tamari enn annars, í hvussu er fyri áskoðararnar.

Hvussu stóru munurin er millum stjørnurnar í Portugal og hesar í nú leika í Fløtugerði, er soleiðis sæð ringt at siga, tí væl kunnu føroyingar gera nógv flott, og sjálvt Raul og Casillas kunnu kiksa tá umræður. Men sjónligt er, at teir allir eru teknist betri fyri, eru skjótari og kvikari og duga betri at skjóta enn okkara menn, og so ... nei, vit mugu bara viðganga, at teir eru betri enn okkara bestu, hóast teir ikki eru fullkomnir.

Tað er eisini ein ávísur munur á, hvat EM-leikararnir forvinna av peningi í mun til teir hjá ÍF og B68. Uttan at vita hvat Niclas gjarar út til sínar leikarar, ella at avdúka hvat okkara leikarar fáa, kunnu vit staðfesta, at munurin er øgiligur. Væl fáa nakrir føroyskir leikarar pening, men teir flestu fáa 2 pør av gaggum, eina drakt og kanska okkurt annað, meðan teir í Portugal fáa í meðal einar 300.000 krónur um vikuna.

Samanumtikið kann tí sigast, at munurin á pengunum er væl størri enn munurin á tí ein kann skoða á vøllinum. Vit halda tí, at vit ikki í ov stóran mun skulu samanbera dystin í dag við tað sum er at síggja á skýggjanum í kvøld ella í morgin. Vit eiga at gleðast um, at okkara menn tey seinastu árini hava gjørt stór framstig, og at serliga teir ungu á ongan hátt smæðast burtur, tá umræður, um nøvnini eru føroysk sum t.d. Hanus, Áki og Fritleif og ikki Henke, Jorge og Ballack - ella fyri tann skuld Jan Dam og ikki Jaap Stam. Góðan dyst.






Vit kunnu øll verða samd um, at dysturin í dag er ein sannur botngysari. Meðan vit hava trý stig, hevur B68 enn einki stig fingið í landskappingini, og sum heild hevur árið higartil verið sera vánaligt. Í steypakappingini gekk heldur ikki serliga væl, og næst seinasta vikuskifti søgdu venjararnir báðir, Petur Mohr og Meinhard Dalbúð, seg úr starvi, tí teir mettu ikki, at teir kundu geva liðnum meira. Í síðstu viku varð Trúgvi Mortensen, sum var hjálparvenjari hjá NSÍ, settur í starv sum høvuðsvenjari, og samstundis hevur ljóðað, at leiðslan hjá B68 hevur sett sær sum mál, at fáa fleiri kreftir at styrkja um liðið. Hvørjir hesir leikarar eru, er eitt sindur torført at fáa uppspurt, men somikið hava vit fingið at vita, at John Heri Dam, sum hevur búð í Danmark seinastu tíðina, skal styrkja um miðvøllin hjá toftamonnum. Hann hevur spælt fleiri dystir við B68 seinnu árini. Frá vælvitandi keldu hava vit eisini fingið at vita, at B68 hevur samband við ein superligaleikara. Herfyri kom eisini ein bulgarskur áleyparin til B68, men hann fór út ímóti VB síðsta vikuskiftið við skaða, og er tí ivasamur til dystin í dag.

Sum sagt aðrarstaðni í leikskránni hevur eisini verið eitt ávíst virksemi í ÍF-stuðlum, at fáa fólk at styrkja um sperda ÍF-liðið. Enn er bert gjørd avtala við Jan Guttesen, og hann verður á miðvøllinum í dag.

Hyggja vit eftir hagtølunum frá dystum seinastu 8 árini ímillum ÍF og B68, eru vit omaná. Vit hava leikt 16 landskappingardystir í tíðarskeiðnum, og hava vit vunnið 7 av hesum, fýra eru endaðir við javnleiki, meðan B68 hevur vunnið 5 dystir.

Um vit hyggja at málúrtøkuni, eru greiðar ábendingar um, at dystirnir eru sera javnir millum liðini. Málúrtøkan er 21 vunnin mál og 21 tapt mál. Hetta vísir samstundis, at dystirnir okkara millum eru málríkir; í meðal eru skotin 2,62 mál pr. dyst. So um hetta heldur, so fáa vit ein málríkan dyst í dag, har helst ein vinnari verður funnin.

Dysturin í dag er sum sagt botndystur, og ein so-kallaður 6 stig-dystur fyri okkum, tí um vit vinna, eru vit seks stig frammanfyri B68, og tað gevur okkum eitt ávíst rásarúm, sjálvt um vandin langt frá er av. Samstundis vil hetta bøta um sjálvsálitið og geva okkum vónir um

*Framhald a bls. 8*


















# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# TIPS 13

## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Aftur í ár skipa teir báðir Birgar og Janus – sum nú búgva í ávíkavist Keypmannahavn og Aberdeen – fyri kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi". Besti tipparin í einstøku kappingunum vinnur ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur eru rættir. Skriva navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í Ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hesaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.*

*TIPS 13-seðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.*

| 1. UMFAR (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Í hvørjum landi/londum er EM 2004? 1. Portugal X. Fraklandi 2. Eysturríki og Ungarn | | | |
| 2. Hvør vann EM 2000 og er núverandi Europameistari? 1. Týskland X. Frakland 2. Italien | | | |
| 3. Nær vann Danmark sítt fyrsta og einasta EM gull? 1. 1988 X. 1992 2. 1996 | | | |
| 4. Hvør er danskur landsliðsvenjari? 1. Morten Olsen X. Allan Simonsen 2. Frank Arnesen | | | |
| 5. Hvør var dómari í EM 2000 finaluni? 1. Pierluigi Collina X. Anders Frisk 2. Hugh Dallas | | | |
| 6. Hvør var 2. áleypari, aftaná Klinsmann, á týska landslidnum í EM 1996? 1. Oliver Bierhoff X. Karl-Heinz Riedle 2. Stefan Kuntz | | | |
| 7. Hvussu eitur heimskendi núverðandi enski liðskiparin? 1. Michael Owen X. Paul Scholes 2. David Beckham | | | |
| 8. Á hvørjum leikvølli var finalan í EM 2000 spæld? 1. Amsterdam Arena X. De Kuijp Stadium 2. Kong Baudouin Stadium | | | |
| 9. Hvør var liðskipari á franska landsliðnum í 1984? 1. Alain Giresse X. Michel Platini 2. Jean Tigana | | | |
| 10. Nær var Danmark fyrstu ferð við í einum EM endaspæli? 1. 1964 X. 1976 2. 1984 | | | |
| 11. Magni á Lakjuni ger seg kláran at skjóta brotsspark. Knappuliga rennur Rúni Elttør framm og skýtur... og langt uppum... Hvat ger dómarin? 1. Dømur málspark X. Dømur umspark og gula kort til Rúna 2. Dømur málspark og gula kort til Rúna | | | |
| 12. Hvussu eita teir báðir sum gera Tips 13 og fara til EM 2004 at hyggja at finaluni? 1. Trúgvi og Birgar X. Janus og Trúgvi 2. Birgar og Janus | | | |
| 13. Sepp Herberger er tann venjarin, id hevur sitid longst sum venjari á Vesturtýska/Týska landslidnum.. Men undir hvørjum heiti var hann betur kendur? 1. Der Grosse aus der Dresdener Wald X. Der Doktor Abwehr 2. Der Weise von der Bergstrasse | | | |

Føroya Bjór

ATLANTIC AIRWAYS

Navn: Bústaður: Telefon:

Klipp ella skræð



## FELAGSARBEIÐI

# Vit royna at styrkja okkum

Nú seks umfør eru leikt kunnu vit bert staðfesta, at tað ikki hevur gingið sum ætlað í landskappingini. – Vit hava bert trý stig av átjan møguligum, og liggja áðrenn dystin í dag á einum 9. plássi, trý stig frammanfyri mótstøðumenn okkara í dag, B68. Hetta er langt og frá tað vit høvdu ætla og vóna, tí nógv orka er løgd í, at styrkja liðið og skapa góðar karmar kring liðið. Tíðliga í vár høvdu venjararnir tikið út ein hóp á umleið 22-23 leikarar, sum skuldu mynda 1. liðshópin. Fleiri av hesum leikarum vóru kanska enn nakað ungir og óroyndir at leika í bestu deildini, men teir skuldu sleppa at "snúsa" til støðið og møguliga sláa til longu í ár. Men tíðliga merktust skaðar, og fleiri av leikarunum hava verið meira og minni skaddir stóran part av venjingartíðini. Nevnast kunnu Jonn, Atli, Ken, Grias og Bárður, meðan Roy og Eyðun – sjálvt um teir hava spælt - hava drigist við skaðar seinastu 4-5 umførini og Hanus er skaddur triðju vikuna á rað. Hetta merkist, serliga tá ið fleiri av nevndu leikarum vóru teir, sum vit høvdu væntað skuldu mynda liðið. Og afturat hesum, hava vit verið serliga hart raktir av leikbannum. – Bartal situr í dag úti fyri aðru ferð í ár, meðan Rúni heldur ikki er við í dag, orsakað av leikbanni.

### Jan við í dag

Tí hevur rættuliga stórt virksemi verið í ÍF-stuðlum seinastu vikurnar at finna avloysarar uttanfyri felagið. Tað er ikki bara sum at siga tað, tí flestu dygdarleikarar spæla við øðrum feløgum. Tað hevur tó eydnast okkum at gera avtalu við ein góðan leikara. Tað er Jan Guttesen, sum hevur leikt fleiri ár við besta liðnum hjá B36, men seinastu trý árini hevur búð í Danmark, saman við damuni Báru og soninum Peturi. Tað hevur eydnast okkum at fáa Jan heim til dystin í dag, og sjálvt um hann ikki hevur leikt saman við okkara monnum, og formurin ikki er rættuliga 100%, so vóna vit, at hann fer at gera mun. Jan fer niður aftur í morgin, men kemur so heim aftur 21. juni og tá verður hann partur av okkara liðið fram til umleið 20. august. Vit bjóða Jan vælkomnum og ynskja honum alt tað besta. Um fleiri leikarar koma vita vit ikki í skrivandi stund.

### Fjepparafelag

Umfram at styrkja okkum á vøllinum, arbeiða vit við at styrkja okkum uttanfyri vøllin eisini. Vit hava tosað við góðar og royndar kreftir, um at samskipa eitt "fjeppara"-felag, sum hevur til uppgávu at koyra á okkara leikarar og fáa lív í teir annars til tíðir stirvnu áskoðararnar. Ætlanin er, at hesir bjóða ÍF-fjepparum at savnast áðrenn dystirnar, og skapa rætta stemningin við floytum, sangum, rópum, andlitsmáling o.ø. Vit vóna, at hesir eru til dystin fús í dag, og um so er vóna vit eisini, at tit taka undir við hesum.

*Framhald frá bls. 3*

at røkka enn longur upp á stigatalvuna. Hinvegin, tapa vit, so er alt enn meira opið enn áðrenn og vandin fyri botnstríðið alt kappingarárið enn størri.

Til dystin í dag mangla vit tveir av stuðulsleikarunum. Bæði Bartal og Rúni eru leikbannaðir. Vit hava tó kært seinna gula kortið hjá Bartali ímóti EB/Streymi, tí vit meta, at Bartal ger ikki brotsspark og tí ikki eigur gult kort. Um hetta gevur nakað vita við ikki í skrivandi stund. Annars eru aðrir leikarar við at verða klárir aftur. – Hanus er við í dag og Atli hevur vant 100% síðstu vikurnar, og situr helst á beinkinum í dag. Ein annar nýggjur leikari hevur eisini víst venjaranum, at hann vil taka kappingina upp um plássini á besta liðnum, og tað er Paul Iburg. Vit vænta, at uppstillingin í dag er soleiðis: Karstin í málinum. Í miðverjuni Áki og Viggo, meðan Fritleif verður í vinstru og Árni í høgru. Á miðvøllinum verða Jan, Høgni Z, Bárður og Hanus og í álopinum verða Magni og Eyðolvur.

**Rasmus Joensen**

**Málarameistari**

**530 Fuglafjørður**

**Tel. 444 139 - 214139**



Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil

Kostnaður 30,-

Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.

Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum, vinnur Apex-flogferðaseðilin.

ATLANTIC AIRWAYS










Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum

á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

Bilverkstaðið
v/ Hans J. Kollsker

**Alfa Seafood Spf**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tlf. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • Fartlf. +298 22 54 75
E-mail: alfa@post.olivant.fo






FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

Heiðursmerkir
Landsins størsta og besta úrval

*Alt innan ítróttarheiðursmerkir, steyp, heiðursmerkir, stakar, plattar...*
EILIF ARGE
Klaksvíksvegur · 700 Klaksvík
Tel. 455164 · Fax 457576 · arge-kl@post.olivant.fo

Piddasahandil og Ribarhús
listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«
opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27

hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði




s.pf JAN MOHR

Timbur- snikkara- og betongarbeiði

Tlf. 44 49 49 Fartlf. 21 99 49-21 89 49



BARNAÚTGERÐ
Ciconia

tel 45 65 30
fax 45 65 31

Klaksvíksvegur 63 · boks 163 · Klaksvík





tann nýggi 407

PEUGEOT

Meinhardt Arge


TOYOTA
TOYOTA AVENSIS
AVENSIS
REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi · 188 Hoyvík · Tlf. 353040 · Fax 353041
www.reyniservice.fo · rs@reyniservice.fo


FAROE
FISKAVIRKIÐ Í FUGLAFIRÐI


Tilfar til umvælingar,
ábøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!
Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126


LEVI'S
RED TAB
JEANS
Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon
VØRDSLAN
WEARHOUSE
Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

Fuglafjarðar Keypssamtøka
Tel 444095 - 444495
Fax 444895 Far 217095

FARPACK

Staravegur 5 • P.O.Box 3099 • FO-110 Tórshavn
Telefon 353000 • Fax 53010
www.farpack.com • e-mail: farpack@farpack.com






WWW.FAROEDIVE.FO
TLF. 218929 / 224224





Alt snikkaraarbeiði verður gjørt.
Øll sløg av vindeygum, hurðum, trappum umframt ymiskar seruppgavur.

Tel 31 71 66 • Fartel 21 71 56
Fax 31 81 31 • Hvalsoyargøta 11

Træsmiðjan GLT



## Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.



- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar



KJ HYDRAULIK

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




**Reiðari innan frakt- & sandbátar**
**Krana- og lastvognskoyring**
**Sandsøla**

SANDGREVSTUR

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8  530 Fuglafjørður  tel. 444 358

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00

**Timburmeistari**
Ingi W. á Tórgarði Tlf. 22 61 12
Bøvegur 12, 530 Fuglafjørður

- Alt Timbur-, snikkara- og stoypiarbeiði
- Sethúsabygging
- Virkisbygningar
- Umvælingar

**Dygd = Trygd**

# SAMKEYP

-tí tað lønar seg

**NORÐAGØTA**

telefon. . . . . . . . . . 44 11 19
skrivstovan . . . . . 44 18 77
fax. . . . . . . . . . . . 44 21 60
fartelefon. . . . . . . 21 03 46

Opið er
manadag - sunnudag kl. 9.00-23.00
p-w@post.olivant.fo

PW




## Skoda Fabia

Frá 132.750

Nógv fyri pengarnar • 10 ára rustgaranti

HONDA NORÐBIL SKODA HYUNDAI

Box 1070 • Oyggjarvegur • Tórshavn • Tel 31 37 07 • Fax 31 08 55





# Góðskan á arbeiðnum altavgerandi

Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar



## JLJ-Bygging

Verkfrøði og húsasmíð

690 Oyndarfjørður
Tel 21 47 87 & 44 47 87
t-postur: jljuul@post.olivant.fo










Timbur-, betong- og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56










OROBLU
Seamless Collection
Alt innan húðrøkt frá
LANCÔME
BIOTHERM
Undirklæði frá
FILA
Ninni
Parfumeri • Lingeri
Fuglafjørður • tel 444344


PrimaVera
ja, tað má tað vera!
Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446


Umvæling og søla av:
BAADER - maskinum
FOMACO - salt sprøjtum
og ymiskum úr rustfríum stáli.
Eisini selja vit: legur, POM, bronsu, messing, boltar og møtrikkar v.m.
P/F Petur Larsen
Bakkavegur - FO-530 Fuglafjørður
tlf. 444174 - fax 444285 - t-post: ol@online.fo
DIMMALÆTTING 341200


Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur


Føroya størsta úrval av teldum og tilhoyri
Støkkið inn á gólvið
SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - 110 Tórshavn - Tlf. 317620 - Fax 317699 - info@tt.fo - www.tt.fo


HAVSBRÚN
Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# LEIKARIN HESA FERÐ BÁRÐUR Á LAKJUNI

## TÚ

**Navn:** Bárður á Lakjuni
**Føðingardagur:** 10.10.78
**Starv:** Læraralesandi og vaski"kona"
**Hædd og vekt:** 179 cm./uml. 80 kg
**Størsta styrki:** puha ... tað mugu onnur helst døma um.
**Størsti veikleiki:** Eg havi óivað fleiri ... men eg má siga at knøini eru til stóran ampa ...
**Torførasti mótstøðumaður:** Tórstein ... J
**Frítíðarítriv:** Ja, eg syngi nógv, spæli ymisk ljóðføri ... og sjálvsagt fótbólturin.
**Vónir fyri 2004:** Fótbóltsliga: At vit megna at halda okkum í 1. deild og vinna Løgmanssteypið ... Annars: At vera ein góður maður og pápi, vinur og annars eitt gott vitni fyri Harran!

## TÍN ÍTRÓTT

**Pláss á vøllinum:** Frammaliga, í hvussu er ...
**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Minnist ikki heilt, men eg haldi, tað var í 1995 og tá spældi ÍF í 2. deild
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Minnist heldur ikki, men eg má hava verið eini 5-6 ára gamal
**Aðrar ítróttargreinar:** Ongar nú ... havi tó roynt okkurt annað, men fótbólturin er nr. 1
**Minningarríkasti dystur:** Havi spælt nógvar slíkar dystir, men ein tann, eg minnist best, mann vera tá vit (ÍF) einaferð vunnu 3-2 á B36 í bólkaspælinum um Løgmanssteypið. Vit vóru aftanfyri 2-0, men vunnu – við bert 10 monnum ímóti 11 – og eg skoraði 2 mál ... minnist ikki akkurát, nær tað var.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Veit ikki heilt, men Magni (systkinabarnið) hevur altíð verið ein fyrimynd.
**Besti fótbóltsleikari:** Maradona
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** veit ikki...kanska badminton.
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Venjing vid bólti ... spæl uppá 2 mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Renning uttan bólt
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Oh my dear ... tað veit eg ikki heilt, og eg orki ikki at skriva so nógv nøvn beint nú (kl er 01:03...)

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Stokt flak við serligari heimagjørdari sós og eplum (eg dugi faktiskt sjálvur at gera hetta...) og mjólk afturvið!
**Besta árið og hví:** 1999 tí tá varð eg giftur, 2001 og 2002 tí tá fingu vit (eg og Mirjam) okkara deiligu gentur, Oddvør og Aimi ... annars má eg siga, at eg sum so altíð havi havt tað gott.
**Slag av tónleiki:** Ilt at siga...men ein sangari/sangskrivari sum altíð hugtekur meg, er Keith Green (kendur kristin amerikanskur sangari).
**Besta sending í SvF:** 3-2
**Besti filmur:** Passion of The Christ var ómetaliga sterkur ...
**At slappa av:** Ein túrur á kummuna er ikki at forsmáa ...
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Maradona
**Stuttligasi persónur:** Heri (systkinabarnið) kann vera ógvuliga stuttligur...
**Sjónvarp/filmstjørna:** Veit ikki, kanska Mel Gibson
**Sangari/sangarinna:** Eisini torført at siga, tí tað eru so nógv dugnalig tónlistafólk.
**Besta bók/blað:** Bíblian er ein óútgrundandi vísdómskelda



## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

# Eingin vann seinast

Seinasta Tips 13 kapping hevur helst verið dekan ov torfør, tí eingin hevði 9 røtt, sum er minsta mark. Ein einstakur hevði 8 røtt, men tað rakk ikki. Um vit skulu biðja tykkum lesa betur upp á ella Birgar skal gera lættari spurningar, fáa vit at síggja hesaferð. Svarið spurningunum á síðu 13 og latið seðilin inn í ítróttarhúsið í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Minnist til, at tit skulu í minsta lagi hava 9 røtt fyri at kunna vinna Jolly kassan og møguleikan at bowla við 1. deildarleikarunum. Minnist eisini til, at allir vinnararnir eru við í lutakastinum um ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

| | | |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá LÍF? | X | Bjørn Krogh |
| 2. Hvør gjørdist enskur meistari 2005/04? | 1 | Arsenal |
| 3. Hvør skoraði sigursmálið hjá ÍF móti KÍ í steypakappingini í ár? | X | Bartal |
| 4. Hvussu eitur pápi Trúgva Nesá? | 2 | Amaliel |
| 5. Er Eilif Eliasen ... ? | 1 | Ein dag eldri enn Maradona |
| 6. Fyrrverandi eigarin hjá Atletico Madrid doyði fyrr í vikuni. Hvussu æt hann? | 1 | Jesus Gil y Gil |
| 7. Grikkaland og Spania komu víðari úr sínum bólki í undanumfarinum. Tey vóru í bólki saman við Ukraina, Armenia og ... ? | X | Norðurírlandi |
| 8. Rusland kom víðari til EM við at vinna 1-0 ímóti Wales á útivølli. Málskjúttin í hesum dysti var ... ? | 2 | Vadim Jevsejev |
| 9. Hvør spælir á heimavølli á Åråsen Stadium? | X | Lillestrøm SK |
| 10. Hann verður kallaður "Nummer 32" í parkini. Navnið er Peter Møller, álopsleikari hjá FCK. Hann hevur eisini spælt við bæði Brøndby IF og AaB, men hvørjum av hesum liðum hevur hann ikki spælt við? | 2 | AZ Alkmaar |
| 11. Gerd Müller hevur skotið flest mál á tí týska landsliðnum. Hvussu nógv? | 2 | 68 mál í 62 dystum |
| 12. EM verður í Portugal í summar, og við eru bodnir ... ? | 1 | 13 dómarar |
| 13. Mitt í dystinum ímóti EB/Streymi kastar Bartal eina gaggu eftir Piotr í EB/Streymi-skúrinum ... Hvat ger dómarin? | 1 | Gevur Bartali reytt kort og dømir óbeinleiðis fríspark |

**Starvsnevnd:**
Formaður
Rúni Petersen, 556661
Varaformaður
Sámal Hansen, 212088
Skrivari
Høgni á Lakjuni, 444418
Peningarøkil
Linda Joensen 222180
Tiltakslimur:
Petur við Gjónna
**Fótbóltsdeild**
Tórstein Joensen, 444706
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Guneif Berjastein, 745041
Hildigarð Eliasen, 228771
Atli Petersen, 268295
Ólavur Larsen, 224659
Samskipanarleiðari:
Hildigarð Eliasen, 228771
**Venjarar**
**1. deild**
Sigfríður Clementsen, 317659/517659
**3. deild**
Mortan Thomsen, 214404
**4. deild**
Esbern Abrahamsen, 744593
**Old Boys**
Kristian Petersen, 444700
**Unglingar**
Ólavur Larsen, 224659
**Dreingir Ø.**
Ólavur Larsen, 224659
**Smádr. Ø**
Ørvar Jacobsen 268685
**Piltar ½ vøll**
Njál R. Petersen, 444994
**Smápiltar**
Hagbardur Joensen, 212636 og Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur**
Jonn S. Thomsen, 229859 og Ørvar Jacobsen 268685
**Smágentur**
Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur 10-12**
Sarita Jacobsen, 253383 og Nikolina Kristiansen, 744060
**Pinkur a-b**
Hanna Poulsen, 262402

Krana- &
Lastvognskoyring
Tel. 217 245 - 284 245 - 444 245

døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
Anja Klemintsdóttir
tlf. 258300
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50



Fuglafjaðrar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

Snikkaraarbeiði
• Vindeygu
• Úthurðar
• Trappur
• Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

DIMMALÆTTING 341200

BERGFROST
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com

AP BUSSKOYRING
V/ Andreas Poulsen
✆ 22 52 20 - 44 17 20

SV - TRANSPORT
530 Fuglafjørður tel. 44 41 77

Allur flutningur við:

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum
Dumparum | Bingjubilum

# ÁRSINS ÍF-ARI 2004

## Eyðolvur AFTUR bestur seinast

Í tapinum ímóti HB hósdagin 20. mei valdu áskoðararnir – sjálvt um tað ikki vóru nógvar atkvøður - aftur Eyðolv at verða besta leikaran. Fyri at verða besti leikarin fær Eyðolvur ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Eyðolvur | 35 | 87 |
| Fritleif | 30 | 59 |
| Áki | 18 | 62 |
| Magni | 12 | 48 |
| Karstin | 11 | 37 |
| Hanus | 10 | 16 |
| Viggo | 7 | 7 |
| Bartal | 6 | 13 |

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst. Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

FA EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen

HARALDSEN -títt keyp-

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-B68, 20. juni 2004

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________



## STØÐAN 1. DEILD MENN - 9. JUNI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 6 | 4 | 2 | 0 | 14 - 5 | 14 | 3 - 0 - 0 | 1 - 2 -0 |
| 2. | HB (m) | 6 | 4 | 1 | 1 | 17 - 7 | 13 | 2 - 0 - 0 | 1 - 1 -2 |
| 3. | VB | 6 | 3 | 2 | 1 | 10 - 5 | 11 | 1 - 1 - 0 | 2 - 1 -1 |
| 4. | NSÍ | 6 | 2 | 3 | 1 | 11 -10 | 9 | 2 - 1 - 0 | 0 - 2 -1 |
| 5. | EB/Str. | 6 | 2 | 2 | 2 | 12 - 9 | 8 | 1 - 1 - 1 | 1 - 1 -1 |
| 6. | B36 (s) | 6 | 2 | 2 | 2 | 11 -10 | 8 | 1 - 2 - 1 | 0 - 0 -2 |
| 7. | GÍ | 6 | 2 | 2 | 2 | 8 -10 | 8 | 1 - 1 - 2 | 1 - 1 -0 |
| 8. | KÍ | 6 | 1 | 4 | 1 | 8 - 9 | 7 | 1 - 3 - 0 | 0 - 1 -1 |
| 9. | ÍF (u) | 6 | 1 | 0 | 5 | 10 -21 | 3 | 1 - 0 - 1 | 0 - 0 -4 |
| 10. | B68 | 6 | 0 | 0 | 6 | 4 -19 | 0 | 0 - 0 - 3 | 0 - 0 -3 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD MENN 2004

| | Leikari | Min | D | Ut | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | | | | | | | | |
| 2 | Áki Petersen | 488 | 6 | 1 | | | | 1 | 62 |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | 7 | 1 | | 1 | | | | |
| 4 | Viggo Johannesen | 540 | 6 | | | | | | 7 |
| 5 | Roy Róin | 290 | 5 | 5 | | | | | 4 |
| 6 | Bartal Eliasen | 513 | 6 | | | | 1 | 1 | 13 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 194 | 4 | | 3 | | | | 2 |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 426 | 5 | | | 3 | 1 | | 59 |
| 9 | Atli Petersen | | | | | | | | |
| 10 | Hanus Eliasen | 315 | 4 | 1 | | | | | 16 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 450 | 5 | | | | | 1 | 87 |
| 12 | Árni Jóhan Petersen | 467 | 6 | 3 | 1 | | | | 2 |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 118 | 2 | 1 | 1 | 1 | | | |
| 14 | Ken Bærentsen | | | | | | | | |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 141 | 4 | 1 | 3 | 1 | | | |
| 16 | Karstin Joensen | 540 | 6 | | | | | -21 | 37 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 315 | 4 | | 1 | | | 1 | |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 517 | 6 | 2 | | 3 | | 3 | 6 |
| 19 | Teitur Joensen | 50 | 4 | | 4 | | | | |
| 20 | Jonn Sólheim Thomsen | | | | | | | | |
| 21 | Tórstein Joensen | 103 | 2 | | 2 | | | | |
| 22 | Paul Iburg | 13 | 1 | | 1 | | | | |
| 28 | Magni á Lakjuni | 402 | 5 | 3 | | 1 | | 2 | 48 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í 1. deild í dag – 7. umfar**
NSÍ - EB/Streymur (varð leiktur í gjár)
HB - KÍ
VB – B36
SKÁLA - GÍ

**Dystir í 1. deild sunnudagin 20. juni – 8. umfar**
B36 - ÍF
GÍ - HB
EB/Streymur – B68
KÍ - VB
NSÍ - SKÁLA (verður leiktur 23. juni)

**Dystir í 3. deild í dag – 7. umfar**
NSÍ – EB/Streymur
Skála - GÍ
HB - SÍ
ÍF – B68
TB - Fram

**Málskjúttar 1. deild**

| | |
|---|---|
| Heine Fernandez, HB | 5 |
| Bogi Gregersen, Skála | 5 |
| Rógvi Jacobsen, HB | 5 |
| Sorin Anghel, EB/Str. | 4 |
| Krzystof Popczynski, GÍ | 3 |
| Rúni Eltør, ÍF | 3 |
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 3 |
| Sonni L. Petersen, Eb/Str. | 3 |
| John Petersen, B36 | 3 |

## VERT AT VITA

Í dag spæla vit okkara sjeynda dyst í landskappingini og hetta er samstundis okkara triðji heimadystur í ár. Vit hava higartil vunnið ímóti NSÍ og tapt ímóti HB heima. Í dag er talan um veruligan botndyst, tí B68 hevur enn einki stig fingið, meðan vit hava bara tey trý, sum vit fingu ímóti NSÍ. Komandi sunnudag spæla vit í Gundadali ímóti árstalsfelagnum, B36. Hetta verður óivað ein torførur dystur, sum krevur at allir okkara leikarar gera ein framúr innsats, eins og vit áskoðarar heppa á okkara menn. ÍF-stuðlar skipa helst fyri bussferð til Havnar í sambandi við dystin komandi sunnudag. Hetta verður lýst við plakatum í handlunum í bygdini týsdagin. Næsti heimadystur er ímóti KÍ sunnudagin 27. juni. Hetta er samstundis seinasti landskappingardystur áðrenn summarsteðgin.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Ken Bærentsen |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Tórstein Joensen |
| 4 | Viggo Johannesen |
| 5 | Roy Róin |
| 6 | Bartal Eliasen |
| 7 | Bárður á Lakjuni |
| 8 | Fritleif í Lambanum |
| 9 | Atli Petersen |
| 10 | Hanus Eliasen |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen (liðsk.) |
| 12 | Árni J. Petersen |
| 13 | Høgni á Lakjuni |
| 14 | Paul Iburg |
| 15 | Eyðun Ryggshamar |
| 16 | Kartin Joensen |
| 17 | Høgni Zachariassen |
| 19 | Teitur Joensen |
| 20 | Jan Guttesen |
| 28 | Magni á Lakjuni |

**Venjari:**
Sigfríður Clementsen
**Hjálparvenjari:**
Bogi Lervig
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Eilif Eliasen
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## B68-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Jacek Przybylski |
| 2 | Herbert í Lon Jacobsen |
| 3 | Jákup Eli Olsen |
| 4 | Oleif Joensen |
| 5 | Ovi Magnussen |
| 6 | Alex A. Troleis |
| 7 | Øssur Hansen (liðsk.) |
| 8 | Øssur Jacobsen |
| 9 | Óli Olsen |
| 10 | Stanislav V. Stankov |
| 11 | Jóhan Petur Poulsen |
| 12 | Mortan Hansen |
| 13 | Jóhan Dávur Højgaard |
| 14 | Eyðstein Skipanes |
| 15 | Mikkjal Thomassen |
| 17 | Kári Sigvardsen |
| 18 | Bogi Petersen |
| 19 | Kristian Anthon V. Andreassen |

**Venjari**
Trúgvi Mortensen
**Liðleiðari**
Jógvan Højgaard



**SUNI JOHANSEN**
**Hans og Jens Albert**

**Búgvi Róin - anlegsgartnari**